## Klumman



**Inna Tornroos**
inna@sosialurin.fo

Vilja tit veruliga hava okkum heim?

»At fáa arbeiði er minsti trupulleikin« - »Komið tit bara, arbeiði fáa tit nokk«

Soleiðis hevur tað ljóðað seinastu árini, eg og familja mín hava kannað møguleikarnar at flyta heim til Føroyar.

Maðurin, ið hevur góða universitetsútbúgving og drúgvar starvsroyndir, hevur sett seg í samband við nógvar, stórar, føroyskar fyritøkur, men higartil hevur ongin bjóða honum nakað starv.

Tí er tað eitt sindur provokerandi at koma heim til Føroyar og lesa í bløðum, hvussu stórur missur tað er fyri føroyska samfelagið, at so nógv ikki velja at flyta heim aftan á loknan lestur.

Kanska er tað tí, at tey sokallaðu størvini í Føroyum ikki eru so serliga nógv - ella eru tað galnir føroyingar, ið vilja koma heim aftur.

Eg skilji, at føroyskar fyritøkur helst vilja hava føroyingar í starv, men skilir ein føroyskt og er hampuligur at tosa tað, burdi tað nærum verið líka gott.

Sjálv havi eg ikki stórar trupulleikar á hesum øki, men tað er kanska av tí grund, at útbúgvin føroysk blaðfólk ikki hanga á trøunum.

Maðurin hevur útbúgving innan búskap, og tað er sjálvandi ein vinna, ið hevur meiri at velja ímillum enn miðlavinnan.

Um føroyska samfelagið skal mennast, og politikkararnir veruliga meina, at teir vilja hava fólk heimaftur á klettarnar, ja, so er kanska tíð upp á at tosa við fyritøkurnar og biðja tær hyggja gjøgnum e-post og brøv, tey hava fingið seinastu árini - kann verða, at bæði ein og fleiri vælútbúgvin, íðin fólk eru at finna í tí bunkanum.



*Føroyska Óluvá Hansen , sum býr í Hirtshals, hevur seymað vakra altardúkin, sum varð lagdur á altarið í Hirtshals kirkju til 100 ára hátíðarhaldið*

# Óluva seymaði altardúk til Hirtshals kirkju

## Hátíðarhald



**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo

Sunnudagin 17. august var hátíðarhald í Hirtshals kirkju í samandi við, at hundrað ár vóru liðin, síðani kirkjan varð vígd.

Til stóra hátíðarhaldið hevði kirkjuráðið biðið Óluvu Hansen, sum til fyri nøkrum árum síðani búði í Hoyvík, men sum nú býr í Hirtshals, um at seyma ein nýggjan altardúk til kirkjuna. Hesin dúkur varð eisini tikin í nýtslu hendan hátíðardagin.

Óluva Hansen greiddi Nordjyske Siftstidende frá stóra arbeiðinum við at brodera dúkin.

Tá hon hevði broderað, skuldi dúkurin vaskast, áðrenn hon kundi klippa í hann. Dúkurin er úr hør, sum tódnar millum seks og tíggju prosent, tá tað verður vaskað . Tí var hon sera spent at síggja, hvussu dúkurin sá út á altarinum.

- Eg var ógvuliga fegin, tá eg legði hann á altarið dagin fyri, og hann passaði so væl, sigur Óluva Hansen, sum hevur lært alt um klassiskt hvítt broderí á kvøldskúla hjá Jenny Simonsen í Havn.

Myndevnini á nýggja altardúkinum vísa til kirkjuligar handlingar: Jákupsstigin, hvítusunnuliljan, krossurin og kalikurin.

Aftan á hátíðargudstænastuna varð boðið til ábit á Norðsjóvarsentrinum, har greitt varð frá søguni hjá kirkjuni í Hirtshals – serliga úr 56 síðurs stóra jubileumsritinum, sum meinigheitsráðið hevur givið út í sambandi við 100 ára dagin.

Formaðurin í kirkjuráðnum sigur við Nordjyske Stiftstidende, at tey hava fyrireikað hátíðarhaldið í eitt heilt ár.

- Vit hava eisini hátíðarhildið at kirkjan lat uppaftur eftir umbyggingina eftir at vit fingu nýtggja urgu, vit hava hátíðarhildið 25 ára haldið síðani Emmersbæk kirkja, sum hoyrir undir Hirtshals kirkju, varð liðug, sigur Evald H. Kristensen, formaður í kirkjuráðnum, við blaðið.

Til hátíðarhaldið hendan dagin prædikaði Søren Lodberg Hvas, bispur.



*Søren Lodberg Hvas, bispur og Finn Olesen, borgarstjóri í Hjørring kommunu, gingu á odda inn í 100 ára gomlu kirkjuna í Hirtshals*

Sosialurin